# Hugleiðingar eftir mikkjalsmessu

**Tað er eitt sindur løgið at hugsa sær, at mestsum alt sum hevur við haga og seyð at gera í dag fer fram á sama hátt sum í 1298, tá Seyðabrævið varð skrivað. Her eru ikki hendar tær stóru broytingarnar**



*Tá summarið av álvara er farið at halla og mikkjalsmessa er farin er tíðin komin, tá menn hugsa um at fara á fjall at reka skurðfjøllini*

## Hugleiðingar



**Jóan Pauli Joensen**

Mikkjalsmessa er farin aftur um bak, tað væl og virðiliga. Fjøllini eru gingin, men tað eru kortini enn teir hagar, har tað eisini verður farið í klipping. Tað er eitt sindur løgið at hugsa sær, at mestsum alt sum hevur við haga og seyð at gera í dag fer fram á sama hátt sum í 1298, tá Seyðabrævið varð skrivað. Her eru ikki hendar tær stóru broytingarnar. Tá sum nú vóru hagar, har alt er kenning, hagar har alt er í felag og so hagar sum hava eina blanding av hesum báðum. Seyðurin verður røktaður, handfarin og flettur á sama hátt, sum í fornari tíð, og okkum dáma enn væl ræst og turt kjøt, uttan mun um frystiboksin er uppfunnin ella ikki. Sjálvandi er eitt og annað broytt, seyðhúsini eru vorðin munandi betri, rættirnir eru eisini vorðnar meira fullkomnar.

Tá summarið av álvara er farið at halla og mikkjalsmessa er farin er tíðin komin, tá menn hugsa um at fara á fjall at reka skurðfjøllini. Hesin áhugin tykist enn at standa við hjá nógvum, og hevur eisini fest í hjá fleiri av teimum ungu, sum hava stóran áhuga fyri seyði.

Eitt er at ganga á fjall, annað er at fletta. Aðrastaðni í tí sokallaða siviliseraða heiminum verður djór, ið verða brúkt til mat, sum skal kunna seljast í matvørubúðum, slaktað á serligum løggildum sláturvirkjum. Soleiðis er ikki í Føroyum, her er eingin slík lóg um sláturvirki.

Eitt sláturvirkið var einaferð, men tað bar seg ikki, tí teir fingu ikki nóg mikið at gera. Eitt er nú í Haraldssundi, sum flettir fyri fólk móti einum ávísum gjaldi.

Uttan mun til um flett verður í Haraldssundi ella í egnum kjallara, so kemur tað undir sama hatt. Fletting av seyði í Føroyum er uttan fyri alla aðra lóg uttan djóraverndarlógina. Alt sum hevur við seyð at gera í hesum landi kemur ikki undir vinnu, men hendur undir tað vit nevna hobbyvirksemi ella mentan. Her er talan um ein fornan mentanararv, sum livir sítt egna lív í bygdunum her á landi. Alt sum hevur við seyð at gera, kundi tí eins væl hoyrt undir mentamálaráðið.

At fletta seyð er ikki partur av nøkrum vinnulívi, men er ein mentanarlig atferð. Ikki tí, tað eru ikki allir føroyingar sum duga at fletta, sjálvt um teir bæði eiga jørð og hava seyð gangandi á trøðni. Fletta teir ikki sjálvir, so hava teir vanliga sínar føstu flettingarmenn og sambandi við flettingarmannin, tað er av serligum slag. Tað eru teir, sum fáa nógvan seyð, verði tað bøndur ella ognarmenn. Hesir klára ikki at fletta alt sjálvir. Teir hava tí sínar føstu flettingarmenn. Summar av hesum hava teir sjálvir lært at fletta. Tað verða knýtt serlig bond millum flettingarmenn og eitt samanhald, menn sum varðar við eitt langt lív. Í flettingarhøpi eru allir líka, antin teir so í dagliga yrki sínum eru bøndur, advokatar ella stjórar. Tað løtuna eru allir aktørar í sama flettingaruniversi. Flettingarmentanin setur við nýggjar flettingarmenn, sum taka við har teir gomlu sleppa.

Tað eru eisini lærarar, sum síggja fletting sum ein so stóran part av okkara mentanararvi okkara, at teir halda at tað er rímiligt læra børnini, um ikki at fletta, so at síggja, hvussu tað verður flett. Fletting kann vera lagdur í tímatalvuna um heystið sum ein partur av undirvísingini í heimkunnleika. Er lærarin kvinna, so fær hon vanliga okkurt mannfólk at fletta. Flett kann

Sosialurin